# Enn ein handtøka í smuglaramálinum

**28 ára gamla kvinnan, ið týsdagin varð tikin á flogvøllinum fyri at smugla 281 gramm av hassj, hevði sambært ákæruvaldinum tveir samsekar. Politiið hevur tikið annan**

Leo Poulsen

Grundlógaravhoyring var beint eftir døgurða í dag í sambandi við smuglaramálið týsdagin.

Í gjár var grundlógaravhoyring av einari 28 ára gamlari danskari kvinnu, sum týsdagin royndi at smugla 281 gramm av hassj til Føroya. Biðið var tá um at hurðarnar vórðu latnar aftur, tí ikki var greitt, hvørjir bakmenninir í Danmark vóru, og hvør tók ímóti hassjinum í Føroyum.

Avhoyringin hevur uttan iva givið úrslit, tí ein 52 ára gamal føroyingur varð í gjárkvøldið um 22.30 tíðina handtikin, og í grundlógaravhoyring beint eftir døgurða í dag varð hann skuldsettur fyri trý brot á lógina um rúsandi evnir.

Í fyrsta lagi varð hann ákærdur fyri í tíðarskeiðinum 19. til 23. mars at hava smuglað 225 gramm av hassj til Føroya og selt hetta fyri 20.000 krónur.

Í øðrum lagi 23. mars at hava pakkað 40.000 krónur at senda til Danmarkar.

Og í triðja lagi saman við tveimum øðrum at hava roynt at smugla 281 gramm av hassj til Føroya.

Maðurin játtaði seg sekan í teimum báðum fyrru ákærunum, men noktaði seg sekan í teirri triðju.

Út frá ákærunum tykist greitt, at løgreglan hevur ein triðja persón í kikaranum, og tí kann roknast við einari handtøku aftrat innan heilt stutta tíð.

Hetta var helst orsøkin til, at ákærin bað um, at hurðarnar eisini í hesum førinum vórðu latnar aftur.



*Ein 28 ára gomul donsk kvinna og ein 52 ára gamal føroyingur eru handtikin fyri at hava smuglað hassj til Føroya*

# Nógvar grundlógaravhoyringar

**Tað hava verið óvanliga nógvar grundlógaravhoyringar hesa vikuna, heilar fýra í tali. Tvær snúgva seg um hassjsmugling, ein um hóttan við knívi og ein um siðamisbrot**

Leo Poulsen

Grundlógaravhoyringar eru rættiliga vanligar, men so títtar sum tær hava verið hesa vikuna er rættiliga óvanligt.

Tað byrjaði týsdagin, tá ein 62 ára gamal maður úr Oyndarfirði varð avhoyrdur í sambandi við, at hann hevði hótt grannakonuna við felliknívi. Hann varð varðhaldsfongslaður í 14 dagar.

Mikudagin var tað so ein 28 ára gomul donsk kvinna, sum hevði roynt at smugla 281 gramm av hassj til Føroya. Hon varð varðhaldsfongslað í 14 dagar.

Og í gjár vóru heili tvær grundlógaravhoyringar í senn. Onnur var ein 52 ára gamal maður, sum varð handtikin í sambandi við smuglaramálið við donsku kvinnuni, og hitt snúði seg um siðamisbrot.

Maðurin, sum var handtikin í sambandi við smuglingina bleiv varðhaldsfongslaður í fýra vikur, harav eina í isolatión.

Grundlógaravhoyringin, ið snúði seg um siðamisbrot varð hildið fyri dupult afturlætnum hurðum, og tí er sjálvt skuldsetingin loynilig.

*Rætturin hevur hesa vikuna verið karmur um ikki færri enn fýra grundlógaravhoyringar*

